TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Dávid Reinert Hansen forstjóri í Vága Floghavn

Nevndin í P/F Vága Floghavn setti í gjár Dávid Reinert Hansen sum forstjóra í felagnum. Finnbogi Niclasen, sum hevur verið flogvallarovasti, meðan flogvøllurin var almennur stovnur, verður somuleiðis limur í stjórn felagsins og kemur framvegis at hava ábyrgdina fyri flogferðslutrygdini, umframt trygdarviðurskiftum í og uttan um terminalbygningin.

Nevndin í P/F Vága Floghavn hevur somuleiðis gjørt av, at søkja eftir einum fíggjarleiðara.

- *Nevndin í P/F Vága Floghavn hevur tikið hesar avgerðir við atliti, at tørvur er á at styrkja um leiðslu felagsins, nú fortreytirnar fyri virksemi felagsins eru nógv broyttar eftir, at flogvallarvirksemi er skipað sum sjálvstøðugt parafelag-felag, umframt at felagið skal í gongd við fyrireiking av stóru verkætlanini fyri útbygging av floghavnini í Vágum, stovnan av tollfríari sølu í floghavnini, o.s.fr.,* sigur Kitty May Ellefsen, forkvinna.

Dávid Reinert Hansen, sum er 48 ára gamal, hevur sum verkfrøðingur og sum fyrrverandi stjóri í P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyartunnilin og P/F Skálafjarðartunnilin, drúgvar royndir við at skipa og stýra stórum byggiverkætlanum, og er nevndin í P/F Vága Floghavn tí væl nøgd við, at Dávid Reinert Hansen hevur tikið av nýggju avbjóðingini, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Dávid Reinert Hansen, sum síðani 24. juli í ár hevur verið limur í nevndini í P/F Vága Floghavn, tekur seg úr nevndini í samband við, at hann byrjar starvið sum forstjóri í felagnum.



*Dávid Reinert Hansen var í gjár settur sum forstjóri í Vága Floghavn*



**Frá Apoteksverki Føroya og Landsdjóralæknanum um koppingarevni fyri garnasótt 2008:**

**Koppingarevni fyri garnasótt kann heintast á apotekunum, sum fráboðað í brævi til kundar okkara, frá hósdegi 25.september 2008.**

**Broytingar í skamtatali v.m. skulu fráboðast Tjaldurs Apoteki á telefon 341100 ella við telduposti til: ordrad@apotek.fo.**

**Apoteksverk Føroya og Landsdjóralæknin**

# Kunningarfundur um útbúgvingarsamstarv við ES

ÚTBÚGVING

Hósdagin 25. september klokkan 15 verður kunningarfundur um útbúgvingarsamstarv við ES. Fundurin verður hildin á Fiskirannsóknarstovuni í Nóatúni 1.

Lifelong Learning Programme er heitið á fjølbroytta og áhugaverda samstarvinum um útbúgving í ES. LLP vendir sær til allir útbúgvingarstovnar frá barnaskúla til vaksnamannaútbúgving.

Eisini føroyska útbúgvingarverkið hevur møguleika at luttaka í hesum samstarvi. Á kunningarfundinum verður greitt nærri frá, hvørjir møguleikar eru fyri føroyingar at luttaka í hesum samstarvi.

Á fundinum luttaka:

Rúna Vigdís Guðmarsdóttir, sum er verkætlanarleiðari á Altjóða skrivstovuni á Háskúla Íslands. Rúna Vigdís greiðir frá um royndir, sum Ísland hevur av at luttaka í LLP, um samfelagsgagn av hesi luttøku, og um hvørji krøv eru til luttakandi útbúgvingarstovnar og til almennu myndugleikarnar í sambandi við luttøku í LLP.

Elisabeth Holm, sum arbeiðir á Altjóða Skrivstovuni í Føroyum. Elisabeth greiðir frá um teir møguleikar, sum eru fyri Føroyar at samstarva við ES um útbúgving.

Birgit Remmel, sum er studentaskúlalærari og orðabókahøvundur. Birgit greiðir frá luttøku á skeiði innan Lifelong Learning Programme.

Kunningarfundurin verður á Fiskirannsóknarstovuni, Nóatún 1, hósdagin 25. september klokkan 15 til 16. Fundurin er almennur.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Elisabeth Holm, tel. 592065 ella við t-posti til eh@ask.fo.

**www.listagluggin.com**



Ingálvur av Reyni, 1993 - Trolaradekk, 130 x 215 cm

**Vit sóknast eftir** verkum eftir Mykines, Reyni, Heinesen, Ruth Smith, Kamban, Glerfoss, Kampmann, Kruse, Waagstein og øðrum dygdargóðum listafólkum í samband við komandi søluframsýning.

**Fréttið nærri við at seta tykkum í samband við okkum.**

ART Listagluggin GALLERIE

Niels Finsensgøta 25 · Tórshavn
Tlf. 322022 · Mob. 210022
e-mail: listagluggin@hotmail.com

týsdag - fríggjadag:.......15.00 - 17.30
leygardag:........................11.00 - 14.00
Annars eftir nærri avtalu !